Tvingsilssøla av skipi

Mikudagin tann 20. februar 2013, kl. 13.00, verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir línuskipið m/s „Reynsatindur" XPZJ, GT 395, NT 120.

Skipið er bygt í 1961 á Søviknes Skibsbyggeri A/S.

Sambært skipaskásetingini eigur Sp/f Reynsatindur, FO-360 Sandavágur, skipið.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni mikudagin tann 23. januar 2013, kl. 14.00, og verður tann, ið metir seg at hava veð í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av Óla Jákup Kristoffersen, advokati, Frúutrød 4, Tórshavn, tlf. 35 33 35 (j. nr. 20120727), AS 2-59/2012, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja skipið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Føroya fútarætt.

Føroya fútarættur
tann 18. desember 2012

Uppstilling til nevndarval í Starvsmannafelagnum

Sambært §9 í lógum felagsins verður boðað til uppstilling til nevndarval í Starvsmannafelagnum.

Veljast skulu 2 nevndarlimir og 2 tiltakslimir. Nevndarlimirnir verða valdir fyri 3 ár og tiltakslimirnir fyri 1 ár á aðalfundi felagsins 9. mars 2013. Uppstillingin skal verða liðug innan 1. februar 2013.

Uppstillað verður á tann hátt, at boðað verður skrivstovu felagsins skrivliga frá, at limur sjálvur ynskir at stilla upp, ella at limur ella limir ynskja at stilla annan lim upp. Stillar limur ella stilla limir annan lim upp enn seg sjálvan, skal samtykki valevnisins fylgja við uppstillingarfráboðanini.

Tann skrivliga frásøgnin um uppstilling skal verða skrivstovu felagsins í hendi ikki seinni enn 1. februar 2013. Í frásøgnini skal verða tilskilað navn og bústaður hjá valevninum, og hvar valevni arbeiðir.

Aðalfundurin velur nevndarlimirnar beinleiðis við vanligum meiriluta.

Limir verða, í seinasta lagi tá aðalfundurin verður lýstur, kunnaðir um, hvørji stilla upp til nevnarval og verða at velja ímillum á aðalfundinum.

Víst verður annars sum heild til § 9 í felagslógini.

Fráboðanir um uppstilling verða at senda til

STARVSMANNAFELAGIÐ
J.H. Schrøtersgøta 9
Postboks 165
110 Tórshavn

SEV

www.sev.fo

Kunngerð um broyttar elprísir

Við gildi frá 1. januar 2013 eru hesir elprísir og føst gjøld galdandi fyri hvørja elinnlegging sær:

Ársnýtsla kWh:	Fast gjald:		Prísur fyri kWh:	
	u/MVG	v/MVG	u/MVG	v/MVG
0 - 10.000 kWh	480,00	600,00	1,51	1,89
10.000 - 100.000 kWh	1.280,00	1.600,00	1,43	1,79
yvir 100.000 kWh	5.280,00	6.600,00	1,39	1,74

Sosialurin, KvR 34 18 00

Brúkarar við ársnýtslu størri enn 5 mió. kWh kunnu fáa serliga gjaldskrá.

Undantikið tá ið streymveitingin er slitin vegna brek á innleggingini, eftirstøðu ella av aðrari orsøk, har málarin ikki verður niðurtikin, verður fasta gjaldið bert kravt fyri tíðina, innleggingin er íbundin hjá SEV.

Fast gjald, sum eigarin hevur ábyrgd av, verður goldið fyri innleggingar, ið ikki verða nýttar, men enn ikki eru uppsagdar.

Ídnaður, landbúnaður, fiskivinna v.m.:
Serstøk gjaldskrá er galdandi fyri ídnaðarvirkir, fiskaaling, landbúnað, fiskivinnu og ávísar edv-tænastur.
Gjaldskráin fyri nevndu vinnur er henda fyri hvørja elinnlegging:

Ársnýtsla kWh:	Fast gjald:		Prísur fyri kWh:	
	u/MVG	v/MVG	u/MVG	v/MVG
0 - 10.000 kWh	480,00	600,00	1,51	1,89
10.000 - 20.000 kWh	1.280,00	1.600,00	1,43	1,79
yvir 20.000 kWh	9.080,00	11.350,00	1,10	1,38

Neyvari upplýsingar um, hvørjar vinnugreinar koma undir hesa gjaldskrá, fáast við at venda sær til eina av skrivstovum elfelagsins.

Kostnaðurin fyri íbindingar upp til 35 amper er nú frá 9.800,- kr. til 13.030 kr. u/MVG og 12.250,- kr. til 16.288,- v/MVG pr. íbinding.

Harafturat er kostnaðurin fyri hvørt amper, sum kemur afturat teimum 35 amperum 1.185,- kr. u/MVG og 1.481,- kr. v/MVG.

Gjøllari gjaldskrá er at finna á heimasíðu okkara www.sev.fo.

Samtykt á eykaaðalfundi tann 30. november 2012.

ELFELAGIÐ SEV

ELFELAGIÐ SEV · POSTSMOGA 319 · 110 TÓRSHAVN · WWW.SEV.FO · SEV@SEV.FO

FØROYA HANDILSSKÚLI

Hægri útbúgvingar á Føroya Handilsskúla

Akademiútbúgving – modul várhálvan 2012

Á Akademiútbúgvingini ber til at seta saman lærugreinir í mun til egin ynskir og tørv. Lesandi tekna seg til eitt modul í senn og er upptøka hálva hvørt ár, tá nýggjar lærugreinar vera bodnar út. AÚ er sett saman av 6 modulum. Um tú tekur 4 modul, hevur tú lokið merkonom. Velur tú síðani at taka tvey modul afturat, hevur tú lokið Akademiútbúgving. Til ber at velja ymiskar breytir, eitt nú innan leiðslu, búskap ella marknaðarførslu.

Komandi lestrarhálvu verða hesi modul boðin út:

Føroya Handilsskúli í Havn

Leiðsla í verki	Mánadag	18.00-21.20
Broytingarleiðsla	Mánadag	18.00-21.20
Sølustrategi	Hósdag	18.00-21.20
Hagfrøði	Mikudag	18.00-21.20

Føroya Handilsskúli á Kambsdali

HR	Hósdag	18.00-21.20
Vinnubúskapur	Týsdag	18.00-21.20

Lestrarbyrjan er treytað av, at nóg nógv tekna seg.

Tilmelding við viðkomandi skjølum á heimasíðu Handilsskúlans, www.fh.fo í seinasta lagið 11. januar 2013.

FØROYA HANDILSSKÚLI

Janusargøta 2
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo

